# HEILSANIR



Foreldur míni og eg takka hjartaliga øllum tykkum, sum vóru við til at gera mær fermingardagin 10. okt. 2004 so hugnaligan og minnisríkan. Eisini ynskja vit øllum eini gleðilig jól og eitt av Harranum signað nýggjár.
**Heilsan, Paula Jóannesdóttir, Argir**



Øllum tykkum, sum høvdu meg í huganum, tá eg varð fermd tann 10.10.04 takki eg hjartaliga. Gleðilig jól og gott nýggjár.
**Malan Heinesen**



Eg og foreldur míni takka hjartaliga øllum tykkum, sum vóru við til at gera konfirmatiónsdagin 04. apríl 2004. so hugnaligan og minnisríkan. Takk fyri gávur, heilsanir og alla hjálpina.
**Jákup Dahl Wardum, Tórshavn**



Eg og foreldur míni takka hjartaliga øllum tykkum, sum vóru við til at gera mær fermingardagin 3. okt. 2004 minnisríkan. Takk fyri gávur og telegramm. Eisini ynskja vit øllum gleðilig jól og gott nýggjár.
**Heilsan, Jógvan Joensen, Tórshavn**



Eg og foreldur míni takka fyri, at tit mintust meg á fermingardegi mínum tann 10.10.04. Eisini ynskja vit øllum eini góð og hugnalig jól og eitt av Harranum signað nýggjár.
**Heilsan Rakul Beinirsdóttir Poulsen, Klaksvík**



Eg og foreldur míni takka øllum, sum gleddu meg á konfirmatiónsdegnum 3. oktober 2004.
**Heilsan, Rasmus R. Zachhav, Toftir**



**Góðu Anna og Marni**
Hjartaliga til lukku við silvurbrúdleypsdegnum tann 20. desember. Góða eydnu framyvir.
**Ynskja starvsfelagarnir**



**Góða, fitta Joanita**
Hjartaliga tillukku við 3 ára degnum. Alt tað besta ynskja
**omma og abbi**



Henda lítla, fitta, stóra genta verður 14 ár 18. des. Alt tað besta ynskja
**omma og abbi, Garðsvegur 15, Sørvágur**



Um nakar spyr, eri eg farin av landinum.
**Heilsan, Shiss, alias Reyði Dreki**



Øll vilja hava mín kropp, eg veit ikki hví?
**Heilsan, eg**



Eg 30 ár, eingin panikkur her.
**Heilsan, »altan sleivin«**



**Góði Høgni**
Hjartaliga tillukku við piparinum.
**Heilsan, Argjabáturin**



**Góða Mildrið**
Hjartaliga tillukku við 17 ára degnum tann 19. desember. Gleði meg til balllið.
**Heilsan, myndatakarin**



**Hey Jón tvilling**
*Tú ert blivin gamal drongur,*
*helt teg vera ordans fongur,*
*men hetta gongur ikki longur,*
*lat so vera at spæla kongur.*


## Heilsanir

30,- kr. Sosialurin

**5 ferðir um vikuna**

**Gevið gætur**

Bert heilsanir, skrivaðar á henda lepan og goldnar frammanundan við 30,- kr. fáa innivist í blaðnum. Til ber eisini at lata okkum lepan og gjald í avgreiðsluni á Argjavegi 26, millum kl. 8.00 og 16.00.

**Myndaheilsanir skulu vera okkum í hendi á miðdegi 2 dagar fyri útkomudag.** Viðmerkið annars niðanfyri, um heilsanin ynskist í blaðið ávísan dag.
❑ Týsd. ❑ Mikud. ❑ Hósd. ❑ Fríggjad. ❑ Leygard.

Tekstur:......................................................................
......................................................................
......................................................................
......................................................................
......................................................................
......................................................................

**Myndina aftur:** Minnist til at skriva navn og bústað aftanfyri á myndina og at leggja við ein frankeraðan brævbjálva við navni og bústaði.
Um neyðugt fyri arbeiðsgongdina, taka vit okkum rætt til at fáa heilsanina í blaðið annan dag, enn tann ynskta.

Sent hevur (skal fyllast út).
Navn: ......................................................................
Bústaður: ..................................................................
Bygd/býur: .................................... Tlf.: .................

Sendið lepan, mynd og gjald til:
Sosialurin
Postsmoga 76 •110 Tórshavn
Merkið bjálvan: »**Heilsanir**«